# 4,5 fólk søgd upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi

ÁKI BERTHOLDSEN

Tær fyrstu sparingarnar, sum ætlanin er at fremja á Suðuroyar Sjúkrahúsi, eru nú settar í verk.

Talan er um 4,5 størv, sum nú eru niðurløgd. og tær endaligu uppsagnirnar vórðu sendar teimum í postinum nú.

Tey vórðu annars uppsøgn beint áðrenn mánaðarskiftið, men tey hava 14 daga hoyringarfreist.

Tann tíðin var úti í gjár men hesa tíðina er onki hent, sum gevur leiðsluni á sjúkrahúsinum møguleika at taka uppsagnirnar aftur.

Tey fólkini, sum nú eru uppsøgd, eru 1/2 starv í køkinum, tvey størv í fysioterapiini, eitt fólk á teknisku deild, umframt fólkið, sum mannar vekslaran.



*Sunnudagin vóru løgtingsmenn og umboð fyri politisku feløgini í Suðuroy á fundi við leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahúsi sparingarnar, sum eru og verða framdar. Men ongi politisk lyfti vóru givin um at støðan skuldi broytast*

**Broytir ikki avgerð**

Leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi royndi annars til tað síðsta, at fáa avgerðina um at siga fólki upp, broytta.

Á fundi við politisku feløgini og løgtingsmenn fyri Suðuroynna sunnudagin, upplýsti Ronni Midjord, umsjónarmaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, at hann hevði spurt Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann í almanna og helsumálum, um uppdagnirnar skuldu takast aftur.

Hann segði, at tað hevði ørkymlað hann at síggja ein tingmann úr samgonguni boða frá, at uppsagnirnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi skuldu takast aftur og hann spurdi samstundis landsstýrismannin, um nøkur grund var at senda tær út yvirhøvur, um tað tær kortini verða tiknar aftur seinni.

Tað, hann sipar til í hesum sambandi, er ein samrøða, sum Sosialurin 20. januar hevði við Hergeir Nielsen, einasta samgongutingmann úr Suðuroy, har hann segði seg kunna veita vissu fyri, at uppsagnirnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi verða tiknar aftur.

Hann segði, at samgongan skilti, at tær sparingar, sum skuldi setast í verk, bóru ikki til.

Men Landsstýrismaðurin svarar aftur, at hann sær ongan møguleika at broyta avgerðina um at siga fólkinum upp.

Leiðslan skeyt eisini upp, at sjúkrahúsið fekk eina millión til lønir av felagsjáttanini uppá 3,9 milliónir til tekniska útgerð til tey trý sjúkrahúsini og at 500.000 krónur verða fluttar frá rakstri til lønir. Men tað fekk ikki undirtøku.

**Helst fleiri uppsagnir**

Hóast fimm fólk nú eru søgd upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi, er tað í øllum førum greitt, at fleiri sparingar skulu gerast.

Ronnie Midjord boðaði eisini fundarfólkinum frá, at hann týsdagin hitti Helenu Dam á Neystabø á fundi.

Og tá boðaði hon frá, at hon sá ongar møguleikar fyri at at útvega Suðuroyar Sjúkrahúsi meiri pening, so at tað slepst undan sparingum í ár.

Tað einasta, hon sigur seg kunna gera, er at søkja tingið um loyvi at flyta 700.000 krónur frá rakstrinum hjá sjúkrahúsinum yvir til lønir.

Ronnie Midjord segði at hann hevði spurt landsstýrismannin, hvar á rakstrinum tað so skuldi sparast.

Men svarið var heilt greitt, at hetta var eitt mál, sum leiðslan á Suðuroyar Sjúkrahúsi mátti loysa.

Sparingarnar, sum eru settar í verk, geva 680.000 krónur.

Góðekur tingið at flyta 700.000 krónur frá rakstri til lønir, eru enn 120.000 krónur eftir at spara.

Og eisini tað fer at kosta størv, kanska tvey, alt eftir, nær uppsagnirnar verða settar í verk.

Góðtekur tingið ikki flytingina, eru hinvegin 820.000 krónur eftir at spara.

Í øllum førum hevur landsstýrismaðurin biðið Suðuroyar Sjúkrahús bíða við uppsagnum á seingjadeildini og í ljósmóðurskipanini, til umsóknin um flytingina er viðgjørd í tinginum.

# Føðideildin á Suðuroyar Sjúkrahúsi er nú í vanda

*Tað kann koma uppá tal at flyta allar barnakonur í Suðuroynni til Havnar*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú er vandi fyri, at allar kvinnur í Suðuroynni, sum skulu eiga, noyðast til Havnar.

Hetta kann gerast ein avleiðing av royndunum at spara á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Á fundinum, sum var ímillum leiðsluna á Suðuroyar Sjúkahúsi og politisku flokkarnar sunnudagin, segði eitt av politsku umboðunum, at tað var ofta skotið honum í skógvarnar, hvat Suðuroyar Sjúkrahús skuldi hava eina føðideild til, tí tað verða so fá børn fødd í Suðuroy.

Hann spurdi tískil fyristøðumannin á sjúkrahúsinum, um hetta var ein sparing, sum kundi koma uppá tal, at leggja føðideildina niður.

Og tað er eftir øllum at døma ikki heilt óhusandi.



*Tað kom dátt við hjá fundarfólkinum at frætta at almanna og heilsumálastýrið hava luftað tankan um at niðurleggja føðideildina á Suðuroyar Sjúkrahúsi niður*

Tí Ronnie Midjord váttaði, at umboð fyri Almanna- og heilsumálastýrið hevði nevnt hetta sum ein møguleika, saman við øðrum møguleikum á einum fundi við leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahúsi fyri kortum.

So hann kundi ikki afturvísa, at hetta var eitt mál, sum tey høvdu í tonkunum.

–Ført varð fram, at tað eru so fáir barnsburðar í Suðuroynni, at ein møguleiki at spara er at niðurleggja føðideildina.

– Av tí, at barnsburðartalið er so lágt, er tað talan um eina lutfalsliga dýra tænastu at hava føðideild á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Í løtuni eru trý størv til ljósmøður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, men bara tvey av teimum eru sett.

Umsjónarmaðurin segði, at støðan var so óviss í løtuni, at hann helt ikki at tað var ráðiligt at seta fleiri fólk sum er.

Men hann váttaði, at arbeiðsbyrðan hjá ljósmøðrunum er ikki størri enn so, enn at ein kundi klára tað.

Men børn hava tað fyri, at tá ið tey verða fødd, spyrja tey ikki eftir, um hetta er ímillum klokkan átta og 16 ein gerandisdag, ella um tað er nátt, vikuskifti, heilidagur ella feriutíð.

Og fyri at kunnu hava eina vaktarskipan, er tað neyðugt við trimum ljósmøðrum.

– Í fyrsta lagi ber tað ikki til at krevja av einum fólki, at tað skal hava vakt alt samdøgurið, 365 dagar um árið.

– Í øðrum lagi eru sáttmálarnir á arbeiðsmarknaðinum soleiðis, at tað kostar tað hvíta út úr eygunum at hava fólk á vakt alla tíðina.

Og tað varð nevnt, at tað var ikki langt frá, at tað er bíligari at hava tríggjar ljósmøður, enn tað er at hava tvær. Og skal bara ein verða, tosa vit um eina inntøku til hana í milliónaklassanum.

Okkurt umboð fyri tey politisku feløgini helt tó, at tað kundi ómøguligt koma uppá tal at niðurleggja føðideildina, tí so skuldi allar barnakonur í Suðuroynni flytast til Havnar ein mánað, áðrenn tær vórðu settar at eiga, og tað kundi mann ikki bjóða fólki nú á døgum.

–Og hvør skal beta eykakosnaðin av tí, var eisini spurt.

Sum tað sæst á greinini omanfyri, er tað í øllum førum greitt, at tað skal sparast enn meiri á Suðuroyar Sjúkrahúsi enn tað, sum longu er sett í verk.



# Suðuroyar Sjúkrahús fær neyvan meiri pening í ár

*Støðan hjá Suðuroyar Sjúkrahúsi er óbroytt eftir fundin við løgtingsmenninar úr Suðuroynni sunnudagin, tí ongin kann lova sjúkrahúsinum meiri pening, so at tað slepst undan sparingum*

ÁKI BERTHOLDSEN

Hóast støðan á Suðuroyar Sjúkrahúsi næstan er samanborin við eina vanlukku, tykist ikki sum at nøkur hjálp er á veg.

Á fundinum sunnudagin fekst so ongin ábending frá løgtingsmonnunum fyri Suðuroynna um, at sjúkrahúsið fer at fáa meiri pening.

Játtanin til lønir á Suðuroyar Sjúkrahús í ár er 1,5 millión og lítil til, at virksemið kann halda fram óbroytt.

Og sum sagt, eru longu 4,5 fólk søgd upp, men at tað slepst neyvan undan fleiri uppsagnum seinni.

Bogi Djurhuus, yvirlækni, vísti á, a frammundan var raksturin á Suðuroyar Sjúkrahúsi so bíligur, sum hann uppá nakran máta kann vera, um mann framvegis skal kalla hetta eitt sjúkrahús, tí tað er ikki eitt tað einasta fólk til avlops nakrastaðni



*Á fundinum við løgtingsmenninar og politisku feløgini sunnudagin, greiddi Ronnie Midjord, fyristøðumaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi frá gongdini og teimum sparingum, sum eru settar í verk og møguleikunum framyvir. Men hann fekk onki lyfti frá politikarunum um meiri pening so at tað kundi sleppast undan sparingunum, sum koma sera illa við*

Hann endurtók somuleiðis tað, hann fyrr hevur sagt fyri Sosialinum, at sum nú er,kann hann heilt skjótt koma í ta støðu, at hann má umhugsa sína framtíð á sjúkrahúsinum.

Á fundinum við løgtingsmennina sunnudagin var tað skjótt at koma til ta niðurstøðu, at tað, sum kravdist var meiri peningur.

**Støðan broytt**

Hergeir Nielsen er einasti tingmaður úr Suðuroynni í samgongu og tískil var tað serligur áhugi fyri tí, sum hann hevði at siga.

Men hann segði, at ongin kann í dag lova Suðuroya Sjúkrahúsi meiri pening.

Tað einasta, hann kundi siga, var, at málið er ikki slept, men at tað verður arbeitt víðari við tí.

Sostatt er støðan broytt, tí 20. januar segði hann í samrøðu við Sosialin, at samgongan skilti, at sparingarnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi kundi ikki setast í verk og at vissa kundi veitast fyri, at tær verða tiknar aftur.

Formaður javnaðarflokssins segði, at tað bar til at leggja eina umsókn um eykajáttan fyri tingið og at tað kravdist ikki so nógv til at fáa hana samtykt. Atkvøðir andstøðan fyri, umframt Hergeir Nielsen, skulu bara tvær atkvøður til afturat úr samgonguni, og tað helt hann var slett ikki óhugsandi.

Men Hergeir Nielsen tók ikki av hesum uppkotinum, sum hann kallaði bert politiskt gass sum einans hevði til endamáls at fáa hann upp at hanga.

Hann vísti, at verður eykajáttan lagt fram um Suðuroyar Sjúkrahús, fara fleiri mál at taka seg upp og so er samgongan farin, áðrenn mann veit av. Eitt nú vísti hann á, at verður uppskot fyri tingið um meiri pening til Suðuroyar Sjúkrahús, má Landssjúkrahúsið eisini fáa, tí har røkkur játtanin til lønir heldur ikki til.

Hann legði afturat, at tað ber ikki til hjá suðuroyar tingmonnum at gera eina nýggja samgongu um Suðuroyar Sjúkrahús.

Hetta meinti eitt umboð frá politisku feløgunum ikki var rætt, tí tá ið uppskotið var frammi um at taka siglingina upp á Skálafjørðin uppaftur, vóru tað bæði tingfólk úr samgongu og úr andstøðu, ið stóðu saman um tað.

## Fundur um støðuna á Suðuroyar Sjúkrahúsi

Sunnudagin tóku tey politisku feløgini í Suðuroynni stig til ein fund við leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahúsi um fíggjarstøðuna hjá sjúkrahúsinum.

Á fundinum vóru umboð fyri tey politisku feløgini, umframt løgtingsmenninir úr Suðuroynni.

Øll møttu upp, uttan sambandsflokkurin.

Ætlanin hevur leingi verið at halda hendan fundin, men hetta var fyrsti dagurin øll tey politisku feløgini og allir teir fýra løgtingsumboðini høvdu játtað at koma.

Fundurin var komin ílag eftir at tað kom fram, at Suðuroyar Sjúkrahús hevur fingið 1,5 millión ov lítið á fíggjarlógini í ár til lønir til at virksemið kundi halda fram óbroytt.

Sostatt skulu sparingar setast í verk og tað er komið sera illa við, tí leiðslan á sjúkrahúsinum hevur alla tíðina ført fram, at tað eru ikki fleiri starvsfólk á sjúkrahúsinum enn avgjørt neyðugt og at sparingar tí fara at raka sera meint.

Fyribils eru 4,5 fólk søgd úr starvi, men støðan er í løtuni slepst ikki undan fleiri sparingum.

Landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum arbeiðir við eini umsókn, til tingið um at sleppa at flyta 700.000 krónur frá rakstrinum til lønir.

Men so eru 800.000 krónur eftir, sum skulu sparast.

Sparingar fyri 680.000 krónur eru longu settar í verk við tað, at tveir fysioterapeutar eru sagdir upp, umframt 1/2 fólk í køkini, en teknikari og tað eina fólkið, ið sat við vekslaran og í leiðbeiningini.

Góðtekur tingið, at 700.000 krónur verða fluttar frá rakstri til lønir, eru sostatt 120.000 krónur eftir, sum framvegis mangla í.

Og eisini tað fer at krevja uppsagnir.

Hvussu nógvar er ikki greitt enn, men tað kann skjótt verða meiri enn ein.

Tað veldst um, nær uppsagnirnar verða settar í verk, tí vanliga uppsagnartíðin er ímillum tríggjar og seks mánaðir, so tað er leingi „at sleppa av við fólk“. Og tess seinni tær verða settar í verk, tess meiri skal sparast fyri at halda játtanina.

Fyribils hevur landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum biðið leiðsluna á Suðuroyar Sjúkrahús bíða við uppsagnum á seingjadeildini og í ljósmóðurskipanini til umsóknin um at flyta 700.000 frá rakstri til lønir er viðgjørd í tinginum.

Góðtekur tingið ikki flytingina, eru tað hinvegin 820.000 krónur, sum skulu sparast afturat.

*–Áki–*





...úr Føroyum 7. juli, 21. juli og 4. august

14 dagar undir sólini

**Costa Dorada**

Flogfelag Føroya skipar aftur í ár fyri ferð til gullstrondina í Spania, Costa Dorada. Flogið verður beinleiðis úr Føroyum 7. juli, 21 juli og 4. august.

Gist verður í kenda feriubýnum Salou, ið liggur við stóru Costa Dorada strondina. Beint við liggur tað størsta stuttleikastaðið, Port Aventura, umframt tað stóra "Vatnlandið". Eisini verður skipað fyri útferðum.

Møguleiki er at velja ímillum 3 ymisk hotel ella íbúðir.

Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita um hendan frálíka møguleikan.

*PRÍSDØMI:* **Hotel Michelangelo** **+, 2 fólk
Íroknað er: Flogferð, ferðaavgjøld, innivist við 1/2 pens.



8.900,- pr. pers.

*PRÍSDØMI:* **Hotel Europa** ***, 2 fólk
Íroknað er: Flogferð, ferðaavgjøld, innivist við 1/2 pens.



9.100,- pr. pers.

*PRÍSDØMI:* **Hotel Estival Park** ****, 2 fólk
Íroknað er: Flogferð, ferðaavgjøld, innivist við 1/2 pens.



10.250,- pr. pers.

• Avsláttur fyri børn 2-12 ár: 1.500,- kr. umframt hópin av øðrum avsláttarskipanum
Kom inn og hoyr nærri...

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 25 • Fax 31 86 70 • e-mail: travel@ff.fo

petur & petur • 320870